Stjørnan-VB 31-27 (13-10):

# Stjørnurnar í finaluni

**Samlaði sigurin hjá Stjørnuni var ongan tíð í vanda, og nú kunnu tær so smátt fara at hugsa um finaludystin móti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Spenningurin var ikki tann stóri undan seinnu hálvfinaluni millum Stjørnuna og VB. Við trygga sigrinum í Vági í bakhondini, skuldi VB at kalla fremja undurverk, um uppgerðin skuldi koppast. Og sjálvt mest trúgvu VB-viðhaldsfólkini mundu eisini hava slept allari vón í so máta.

Tí var tað eisini so sum so við intensitetinum. Sjálvandi vildu báðir partar vinna. Og eingin nakað fyri einki. Men samstundis, so vistu spælararnir við sær sjálvum, at talan ikki var um ein alt ella einki dyst. Og ikki minst, at liðini bæði framveigs hava eina harða landskapping at hugsa um, har býttir skaðar og/ella leikbann kunnu koma illa við.

Tað var annars VB, sum byrjaði dystin betur, men tað var tó skjótt, at vertirnir eisini komu á rætta lagið. Stutt fyri hálvleik fekk Stjørnan eisini togað seg framum, og tí leiðsluni høvdu tær ongantíð hug at sleppa. Eitt skifti eftir steðgin tóktist talan tvørtur ímóti at gerast um sannan stórsigur, mne tað hendi so ikki. VB fekk pyntað nakað um móti endanum, men meira enn hetta pyntið gjørdist talan ongan tíð um. Til tess hevði munurin í fyrra dystinum verið ov stórur.

Og soleiðis verða tað aftur í ár Stjørnan og Neistin, sum skulu dystast í finaluni. Ein dystur, har Stjørnan helst má finna seg í favorittleiklutinum. Menn tann leiklutin munnu tær kortini kenna heilt væl, soleiðis sum árið hevur gingið. Hvørt talan so verður um greipuna í ár, er ein annar spurningur. Fyrri partur av tí spurninginum verður svaraður um tvær vikur.

**FAKTA UM DYSTIN**

**Stjørnan-VB 31-27 (13-10)**.
Stjørnan í finaluni við samanlagt 56-44
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Alina Olaru 7(1), Una Olsen 7, Bára S. Klakstein 6, Anna Kristina Samson 4, Joan M. Djordjevic 3, Katarina Stepanov 2, Maria við Neyst 1, Alina Olaru 7,, Louisa Andreasen 1(1)
**VB:** Daiva Toumaite 12(1), Rannvá Augustinussen 5, Christina Holm 5(1), Margreth Augustinussen 2, Maryna Zylko 2, Monica Samuelsen 1
**Útvísingar:** Stjørnan 3, VB 4
**Brotskøst:** Stjørnan 3, VB 4
**Dómarar:** Kári Hansen & Hartvig Joensen



*Við seks málum átti Bára S. Klakstein sín lut í sigrinum hjá Stjørnuni á VB sunnudagin*
*Mynd: Bárður Lydersen*

## Finn aftur í B36

Hóast venjingarnar nú av álvara eru farnar ígongd, so eru dyrnar hjá ymsu fótbóltsfeløgunum kring landið enn ikki læstar.

Í B36 hava tey fyri stuttum ásanna, at Pól Thorsteinsson ikki verður partur av liðnum, sum nú skal verja FM-heitið, og tí hevur verið hugt at møguleikum at styrkja um verjupartin.

Og ein partur av svarinum er nú komin í rættlag. Finn Mørk var partur av ungu spælarunum, sum komu upp gjøgnum røðina hjá B36 fyri einum tíggju árum síðani, men tað hevur tó verið avmarkað, hvussu nógv hann hevur gjørt um seg í árstalsfelagnum. Hann var tó partur av hópinum, sum í 1997 vann FM-heitið, men síðani hevur tað verið avmarkað, hvussu nógv hann hevur gjørt um seg. Eitt skifti spældi hann fótbólt á Toftum, men síðani hevur tað fyri tað nógva verið hjá føroyska útisetafelagnum, ÍF Føroyum, at hann hevur gjørt um seg. Hetta meðan hann hevur nomið sær útbúgving sum jarðfrøðingur.

Lestrartíðin er nú um at vera av, og týsdagin kemur spælarin til Føroya og B36. sum skilst, so verður steðgurin her heima í øllum førum hetta kappingarárið. Hetta meðan ritgerðin í lesnaðinum verður skrivað.

**-mørk**

H71-StÍF 22-20 (12-7):

# Gullspæl í hálvan tíma

**Fyri steðgin spældu hoyvíkingar effektivt verjuspæl, uttan stórvegis møsn. Men tað var tó um reppið, at teir kortini lorkaðu sigurin burtur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hoyvíkingar vunnu seg leygardagin einsamallar í oddin í føroyskum manshondbólti.

Talan var enn einaferð um týdningarmiklar uppgerð millum oddalið, tá StÍF var komið á vitjan. Og við sigrinum sementeraði H71 sína støðu sum ein av heilt alvorligu FM-biðlunum í ár.

### Verja og málverji

Fyri steðgin var talan at kalla eisini um meistaraspæl. Við sera disciplineraðum verjuspæli, megnaðu heimamenninir nærum at halda StÍF púrasta frá skoringsmøguleikum. At StÍF ikki hevði nakra ferð á álopsspælinum, gjørdi sjálvandi ikki uppgávuna truplari í so máta, men tað var tó merkisvert, hvussu væl verja og málverji arbeiddu saman. Eitt var, at Levi tók alt, sum kom á hansara síðu í málinum. Annað var, at hann ikki eina tí einastu ferð varð seldur av verjuni, og tí gjørdist eisini hansara uppgáva av tí lættara slagnum.

Og strandingar tóktust ikki at hava nøkur vápn, sum kundu venda gongdini. Í øllum førum, so vórðu hesi ikki nýtt fyri steðgin. Og tað boðaði eisini frá óvanliga stórum passiviteti, at bonkurin als ikki gjørdi nýtslu av time-out møguleikanum fyri steðgin. Ístaðin koyrdi spælið alla tíðina í sama spori, har Alexandur og Leivur vóru mest sum teir einastu at bjóða av. Men har hvørgin teirra hevði stórvegis hepni við atsóknum sínum.

### Dýrir avbrennarar

Onkur hevði á munni í steðginum, at tað kanska var soleiðis hjá StÍF, at teir enn merktu hørðu dystirnar móti Kyndli í beinunum. Og at uppgávan tí var mest sum vónleys.

Hvørt teir enn vóru nakað tungir, er ilt at meta. Men teir tóktust so ikki halda, at uppgávan var vónleys. Frá byrjan av seinna hálvleiki royndi StÍF at toga seg aftur í dystin. Tað eydnaðist tó ongan tíð at koma heilt upp á javnt, men fleiri ferðir høvdu teir tó av álvara møguleikan at toga seg aftur í dystin.

Men hvørja ferð, so vórðu møguleikarnir misnýttir. Ikki minst var seinasta royndin hjá Arturi Johansen ein av teimum dýru avbrennarunum. H71 hevði annars verið á odda 21-17, og tóktist hava punkterað dystin. Tvey skjót strandamál skaptu tó nakað av spenningi aftur, og við nærum tveimum minuttum eftir, kundi talan verið um øgiligan endaspurt. Men Jens á Skipagøtu bjargaði royndini frá púrasta leysa Artur, og so kundu hoyvíkingar draga andan nakað lættari. Eisini hóast tað kortini eydnaðist gestunum at minka um munin. Tá vóru vóru tó bara 15 sekund eftir, og tí eingin veruligur vandi. Og tá Jakob so eisini skoraði vakurt úr spískum í seinasta sekundinum, varð sigurin staðfestur.

### Liggja væl

Og hesin heldur framvegis H71 á beinari finalukós. Við fýra stigum niður til StÍF er hóttanin frá hesi síðuni heldur ikki eins stór, sum hon hevur verið. Áðrenn farið verður í holt við seinnu hálvu av endaspælinum, hava hoyvíkingar á pappírinum lættan dyst, og tí liggja teir nú sera væl fyri í royndunum eftir øðrum finaluplássinum.

Her er StIF enn ikki heilt útspælt. Men tað er greitt, at uppgávan hjá teimum nú er væl truplari, enn hon hevur verið. Komandi vikuskifti eiga teir heimadyst móti VÍF, og tann dysturin skal helst enda við sigri, um strandingar skulu gera sær nakrar vónir um FM-heitið.

**FAKTA UM DYSTIN**

**H71-StÍF 22-20 (12-7)**
**Málskjúttar**
**H71:** Halgir Dahl Olesen 8(1), Tróndur Vatnhamar 6(1), Sigtór Andreasen 3, Niels Viggo Niclassen 2, Piti Negru 2, Jakob Jónsson 1
**StÍF:** Alexandur Johansen 10(5), Leivur Justinussen 4(1), Artur Johansen 3, Bent Djurhuus 1, Bárður Danielsen 1, Jørmund Joensen 1
**Brotskøst:** H71 3, StÍF 9
**Útvísingar:** H71 6, StÍF 4
**Dómarar:** Jørn Møller Nielsen & Gert Aagaard. Høvdu eina hampuliga trygga linju. Og uppgávan gjørdist kanska eisini lættari, tá spælararnir heilt greitt høvdu virðing fyri útlendska parinum.